Fortuna Odense-SK Aarhus 3-0 (25-18, 25-10, 26-24):

## Gekk ikki hjá Juannu

**SK Aarhus hevði settbólt í triða settinum, men frúgvin Fortuna var við Fortuna, sum fekk ivasaman bólt við sær. Og so trumfaðu tær báðar teir seinastu bóltarnar ígjøgnum**

Flogbóltur
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki Juannu S. Joensen at gerast triði føroyingurin, sum gjørdist útlendskur steyapavinnari í flogbólti. Leygardagin spældu Juanna og liðfelagarnir úr SK Aarhus danska steypafinalu, og her gjørdist talan um 3-0 tap fyri Fortuna úr Odense.

Fortuna var saman um tikið betra liðið í finaluni, og serliga tey bæði fyrstu settini sótu tær á øllum. Triða settið kom Aarhus tó væl við, og tær høvdu eisini settbólt við støðuni 24-23. Tær hildu seg eisini hava vunnið settið, tá ein lang serva frá Fortuna sá út til at vera úti. Men dómararnir dømdu bóltin innanfyri, og so kundi Fortuna framman fyri 1.300 áskoðarum seta punktum við eisini at taka teir báðar næstu bóltarnar.

## Tryggir sigrar

Tveir dystir vórðu spældir í meistaradeildini hjá kvinnum hetta vikuskiftið.

Í Hoyvíkarhøllini vann TB ein knúsandi tryggan 3-0 sigur, tá tær vitjaðu hjá KÍF. Sigurin hjá gestunum var ongantíð í vanda, og tað kundi bent á, at TB nú av álvara er við at hita upp til steypafinaluna, sum tær skulu spæla móti ÍF.

Á Giljanesi var Mjølnir á vitjan hjá oddaliðnum, Dráttur, og heldur ikki her var nakar ivi. Hóast Mjølnir var væl við seinasta settið, so var ongan tíð nakar ivi um, at heimaliðið var væl sterkari, og tær fingu soleiðis byrjað endaspælið á sama hátt, sum tær endaðu grundspælið.

Úrslit, meistaradeild kvinnur:
KÍF-TB 0-3 (16-25, 16-25, 12-25)
Dráttur-Mjølnir 3-0 (25-17, 25-17, 29-27)
*-mørk*

Mjølnir-SÍ 3-0 (25-19, 25-19, 25-23):

# Mjølnir í steypafinaluni

**Við tryggum 3-0 sigri móti skerda SÍ-liðnum, vann Mjølnir sær sætið í steypafinaluni hjá monnum.**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan gjørdist ongan tíð um tann spennandi dystin, sum fleiri annars høvdu roknað við. Fremsta orsøkin var kanska, at sørvingarnir undan dystinum vóru skerdir við bæði sjúku og skaðum, og tó at nýggir leikarar eisini vóru komnir í hópin, so megnaðu hesir ikki uttan víðari at seta seg ígjøgnum.

Tað skerst tó ikki burtur, at Mjølnir eisini spældi ein góðan dyst. Triða settið slakaðu teir tó nakað, men í teimum báðum fyrstu settunum góvu teir greitt til kennar, at teir ikki ætlaðu sær at geva nakað sum helst burtur.

Í finaluni verður mótstøðuliðið Fleyr, sum er oddalið í landskappingini. Hartil hevur Fleyr vunnið bæði FK-kappingina og Mjølnir kappingina hetta kappingarárið, so tað líkist einum havnarliði í serflokki, sum klaksvíkingarnir skulu takast við.




*Talan var ongan tíð um nakran sum helst iva, tá Mjølnir leygardagin vissaði sær sætið í steypafinaluni hjá monnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Føroyski landsliðsvenjarin fylti 35 ár, tá Tromsø leygardagin vann 3-0 á Lier*

BK Tromsø - Lier VBK 3-0 (25-19, 29-27, 25-23):

# Magnus fekk sigur í gávu

**Føroyski landsliðsvenjarin fekk ein tryggan 3-0 sigur í føðingardagsgávu, tá Tromsø leygardagin spældi móti botnliðnum, Lier úr Oslo**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki annað væntandi, enn at Tromsø skuldi vinna ein tryggan sigur. Liðið, sum telur tveir av føroysku flogbóltsútisetanum, og sum á beinkinum hevur føroyska landsliðsvenjaran, er partur av oddastríðnum í Noreg, og tí var ein sigur heilt einfalt eitt krav.

Magnus Aðalsteinsson, venjari, fylti eisini 35 ár hendan dagin, og tað mundi sum so eisini vera ein høskandi føðingardagsgáva, at talan gjørdist um somikið tryggan sigur.

Um dystin verður annars sagt, at hesin ikki var millum teir bestu, sum Tromsø hevur spælt. Bæði Bárður B. Mikkelsen og Rúni Weihe byrjaðu hesaferð inni, men byrjanin tóktist onkursvegna merkt av finalusigrinum fyri viku síðani. Næsta settið var um at ganga galið, og eitt skifti hevði Lier eina leiðslu upp á fimm bóltar. Tað eydnaðist tó Magnusi at fáa skil á liðið, og í triða settinum hevði heimaliðið tamarhald á, hóast settúrslitið ikki var so sannførandi.

Komandi umfarið skal Tromsø á vitjan hjá Trondheim og Kristiansund, og tað tykjast vera tveir týdningarmiklir dystir í endaspælinum.

**FLOGBÓLTSSTØÐUR**

**MEISTARADEILD, KVINNUR**

V T
+/-

| | | D | V | - | T | SETT | SETT | SETT | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | DRÁTTUR | 11 | 11 | - | 0 | 33 | 9 | 24 | 12 |
| 2 | SÍ | 11 | 8 | - | 3 | 27 | 18 | 9 | 9 |
| 3 | ÍF | 11 | 6 | - | 5 | 24 | 20 | 4 | 6 |
| 4 | TB | 11 | 5 | - | 6 | 21 | 18 | 3 | 6 |
| 5 | MJØLNIR | 11 | 2 | - | 9 | 12 | 30 | -18 | 2 |
| 6 | KÍF | 11 | 1 | - | 10 | 9 | 31 | -22 | 1 |

**MEISTARADEILD, MENN**

| | | D | V | - | T | V SETT | T SETT | +/- SETT | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FLEYR | 8 | 7 | - | 1 | 22 | 10 | 12 | 7 |
| 2 | SÍ | 8 | 6 | - | 2 | 21 | 10 | 11 | 6 |
| 3 | MJØLNIR | 8 | 4 | - | 4 | 17 | 13 | 4 | 4 |
| 4 | ÍF | 8 | 3 | - | 5 | 14 | 17 | -3 | 3 |
| 5 | NØVAN | 8 | 0 | - | 8 | 0 | 24 | -24 | 0 |

**SUNSET-KAPPINGIN**

**FM-BÓLKURIN**

| | | D | V | - | J | - | T | V MÁL | T MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 48 | 40 | 8 | 4 |
| 2 | STJØRNAN | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 49 | 46 | 3 | 2 |
| 3 | NEISTIN | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 42 | 44 | -2 | 2 |
| 4 | KYNDIL | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 35 | 44 | -9 | 0 |

**NIÐARI BÓLKURIN**

| | | D | V | - | J | - | T | V MÁL | T MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | STÍF | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 48 | 37 | 11 | 4 |
| 2 | VÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 48 | 47 | 1 | 2 |
| 3 | TJALDUR | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 42 | 47 | -5 | 0 |
| 4 | SØLJAN | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 36 | 43 | -7 | 2 |

**ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN**

| | | D | V | - | J | - | T | V MÁL | T MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 332 | 278 | 54 | 10 |
| 2 | KYNDIL | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 325 | 284 | 41 | 10 |
| 3 | VÍF | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 324 | 316 | 8 | 10 |
| 4 | STÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 301 | 306 | -5 | 8 |
| 5 | KÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 298 | 332 | -34 | 4 |
| 6 | NEISTIN | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 314 | 378 | -64 | 1 |